gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Komið í rasshaft

## *Oddagrein*

LÍKT er til, at landsstýrið er komið í rasshaft í sjálvstýrismálinum. Fráboðanirnar í ólavsøkurøðu løgmans eru ikki serliga greiðar. Tær eru heldur trilvandi, og geva ikki nakra greiða ábending um, hvat vit kunnu rokna við.

LANDSSTÝRIÐ ásannar, at tað verður neyðugt hjá okkum at skipa ta neyðugu skiftistíðina fyri at skapa tryggleika fyri framtíðina hjá Føroya fólki. Hetta, tí danska stjórnin heldur fast um eina fýra ára langa skiftistíð. Ja, landsstýrið ásannar, at hetta »uppskotið er ikki til samráðingar, og tí ultimativt«.

MEN seinni staðfestir løgmaður, at landsstýrið arbeiðir við »at útvega eitt óheft búskaparligt grundarlag, sum kann nýtast sum grundarlag fyri eini politiskari semju um eina rímuliga búskaparliga skiftistíð«.

HÓAST landsstýrið staðfestir, at uppskotið hjá donsku stjórnini – sum meirilutin í fólkatinginum tekur undir við – er ultimativt, so hevur landsstýrið kortini eina vón. Tí verður eitt »óheft búskaparligt grundarlag« útvegað. So kann spyrjast, um hetta ikki er í so bláoygt, tá vit hava allar viðmerkingarnar hjá donskum politikarum – úr samgongu og andstøðu – í huga!

KANSKA. Men landsstýrið byggir borð fyri báru. Tí løgmaður boðar eisini frá, landsstýrið leggur dent á at fyrireika føroyska samfelagið í eini skiftistíð til fult sjálvbjargni. Tí skal ein búskapargrunnur stovnast, sum skal geva møguleika fyri at »leggja okkara egnu, tryggu skiftistíð til rættis yvir eitt ávíst áramál«. Hvaðani peningurin skal koma í grunnin, sigur løgmaður einki um.

LANDSSTÝRIÐ heldur óivað, at politikkurin er greiður, men munnu tað ikki vera mong sum halda – við ólavsøkurøðuni í huga – at landsstýrið í løtuni ikki veit síni livandi ráð. Tjóðveldisflokkurin kann góðtaka eina stutta skiftistíð, men Fólkaflokkurin hevur ásannað, at eingin fólkaatkvøða verður, um skiftistíðin ikki verður eini 12 ár!

FLESTU føroyingar halda, at stjórnin og fólkatingið eru í so »stívrend« og at danir áttu at kunna tryggja Føroyum eina longri skiftistíð, um stjórnin meinti nakað við avtaluna við landsstýrið í juni í 1998. – Men eru vit ikki komin í verandi støðu, tí føroyska »uppkastið« til eina nýggja stjórnarskipan legði frá byrjan ikki upp til virðiligar samráðingar millum tveir partar, sum andstøðuflokkar á tingi m.a. hava víst á? Harafturat hava ótaldar kanningar víst, at føroyski veljarin ynskir eina skipan sum liggur millum heimastýrisskipanina og loysingina!

***Sosialurin***

# Limirnir flýggja frá Greenpeace

*Umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace er í stórum trupulleikum og hevur í dag 2,6 milliónir færri limir í dag, samanborið við miðskeiðis í 80'unum. Í norðanlondum er bert ein deild eftir, mótvegis fýra fyri tveimum árum síðani*




Jógvan H. Gardar, Oslo

Sambært bretska blaðnum Sunday Times, ið hevur fingið atgongd til komandi ársfrágreiðingina hjá felagsskapinum, so hevur felagsskapurin nógv at stríðast við. Serliga eru teir fíggjarligu trupulleikarnir stórir, samstundis sum stór innanhýsis ósemja ger arbeiði sera trupult.

Og støðan gerst ikki fræggari av at Thilo Bode, ið samskipar arbeiði hjá Greenpeace International og teim 30 lokalu deildunum, nú hevur sagt seg úr starvi.

### Víðgongdir

Ein av stovnarunum av Greenpeace, Patrick Moore, er í øðini inn á leiðsluna, og kallar hana fyri bæði víðgongda og vinstrahalla. Hann meinar eisini at leiðslan í dag ikki hevur evnini til at góðtaka vísindalig prógv í sínum arbeiði fyri eitt betri umhvørvi.

Sambært norsku tíðindastovuni NTB hevði Greenpeace fleiri enn fimm milliónir limir fyri 15 árum síðani, men í 1994 var talið um 4 milliónir. Seinastu tølini skulu vísa at nú eru ikki fleiri enn umleið 2,4 milliónir limir eftir.

Tey atfinningarsomu hava víst á at Greenpeace meir og meir minnir um felagsskapir og fyritøkur sum tey vanliga hava funnist at. Til dømis hevur tað ikki hóvað øllum umhvørvisvinarligum sálum, at Greenpeace fyri stuttum leigaði eina heila italienska bygd, har tey í eina viku hildu fund fyri leiðarum sínum. Og tey komu øll sjálvandi við flogførum til Italia.

Fíggjarligu trupulleikarnir merkjast nú í felagsskapinum, og krøvini frá leiðsluni í Amsterdam, har Greenpeace International heldur til, er at allar tjóðarligar deildir skulu geva eitt yvirskot. Gera tær ikki tað, so verða tær kastaðar út úr Greenpeace-familjuni.

### Stongja deildir

Feskastu tíðindini siga at Greenpeace Ukraina skal latast aftur, og fyri stuttum læt írska deildin aftur.

Her í Norðanlondum hevur gingið av skriðuni seinnu árini. Í Noregi kom felagsskapurin við egnari deild í 1988, men í 1998 var tíðin komin til at lata aftur. Greenpeace Noreg, Greenpeace Svøríki og Greenpeace Finland blivu í 1998 lagdar saman til eina deild við skrivstovu í Stockholm. Fyri einum ári síðani var tíðin komin til at lata aftur í Danmark. Greenpeace Danmark er nú eisini ein partur av Greenpeace Norden í Stockholm.

Í USA hevur felagsskapurin seinastu fimm árini mist meir enn 700.000 limir, og hevur í dag umleið 300.000 limir. Í Stórabretlandi er meir enn hvør triði limur horvin seinastu fimm árini, og har eru í dag umleið 200.000 limir eftir.

# Norski fiskiflotin eldist

Seinastu tíggju árini er meðalaldurin øktur við fimm árum, úr 19 uppí 24 ár. Hetta vísa tøl sum eru almannakunngjørd í ársfrágreiðingini hjá Fiskeridirektoratet.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður mín og pápi okkara

**KARL VANG**
Kaldbak

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjamorgunin 28. juli, 83 ára gamal.

Ístaðin fyri blómur, kann ein gáva latast til Zarepta.

*Fyri tey avvarðandi*

**Anna, Haldur, Eyðun, Hjørleif, Annfinn, Karin, Hanna, Arna og Karstin**



# Fullveldi: Vit skulu sjálvi betala eina rímiliga skiftistíð

*– Landsstýrið fer longu í heyst at leggja uppskot fyri tingið um at seta ein búskaparligan skiftisgrunn á stovn. Samstundis skal útbúgvingarstuðulin hækkast*



*Danska stjórnin hevur gjørt greitt, at blokkstuðulin fer at minka undir øllum umstøðum, um livistøðið í Føroyum verður ov høgt, segði Anfin Kallsberg, løgmaður, í ólavsøkurøðuni* *Mynd: Jens K. Vang*

-Samstundis, sum samráðingar eru við donsku stjórnina um fullveldi, arbeiðir landsstýrið miðvíst fyri at laga føroyska samfelagið til eina trygga skiftistíð.

Tað segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, í ólavsøkurøðu síni, tá ið tingsetan 2000 varð sett ólavsøkudag.

- Nú, vit hava havt tríggjar fundir, er tað greitt, at um partarnir nýta neyðuga orku og tíð upp á veruliga samráðingar, kann sáttmálin gerast liðugur, so hann kann leggjast fyri Løgtingið og Føroya fólk til støðutakan. Anfinn Kallsberg segði,at higartil hava samráðingarfundirnir í stóran mun líkst einum valstríði mótvegis danska og føroyska veljaranum gjøgnum fjølmiðlarnar, heldur enn veruligar og virðiligar samráðingar. Danska heildarveitingin til Føroya hevur verið høvuðsamboðið í hesum valstríði, sum tíverri hevur vent kikaranum móti óneyðugum trupulleikum og fordómum, og hevur lýst føroyingar sum krevjandi móttakarar frá danska skattgjaldaranum, heldur enn at lýsa teir stóru møguleikar og avbjóðingar, sum standa fyri framman í einum sjálvstøðugum Føroyum, segði Anfinn Kallsberg.

- Hetta staðfestir, at føroyingar hava ikki nakra politiska javnstøðu í altjóða fólkarætti. Tí lýsir samráðingargongdin júst tørvin á, at føroyska tjóðin nú fær evsta valdið og fulla ábyrgd fyri egnum viðurskiftum, segði løgmaður.

Hann legði afturat, at landsstýrið er sannført um, at tað fer at eydnast at koma burturúr teirri óvirðiligu støðuni í samráðingunum. Tí miðjar landsstýrið eftir at fáa samráðingarnar lidnar, so úrslitið kann leggjast fyri Løgtingið og til fólkaatkvøðu, eftir at sáttmálin er undirskrivaður.

### Betala okkara egnu skiftistíð

Anfinn Kallsberg legði dent á, at samstundis, sum samráðingarnar verða gjørdar lidnar, arbeiðir landsstýrið miðvíst fram ímóti at fyrireika føroyska samfelagið til eina skiftistíð og til fult sjálvbjargni.

Hann segði, at longu fyrst í tingsetuni verða stig tikin til hetta.

- Vit fara at leggja uppskot um ein búskaparligan skiftisgrunn fyri Løgtingið. Grunnurin skal hýsa teimum upphæddum, sum skulu nýtast í skiftistíðini. Grunnurin kann samskipast við tann búskapargrunnin, sum uppskot er um í Hvítubók, og sum ætlanin er at stovna í sambandi við møguligar inntøkur av ráevnisvinnu.

- Í fyrsta umfari er tó talan um ein beinleiðis skiftisgrunn, ið fer at geva landsstýri og løgtingi møguleika at legga eina egna, trygga skiftistíð til rættis yvir eitt ávíst áramál, segði løgmaður

Hann segði, at uppskot verður eisini lagt fyri tingið um at víðka føroysku útbúgvingarstuðulsskipanina til allar lesandi føroyingar uttanlands. Landsstýrið skjýtur upp, at útbúgvingarstuðulin verður á sama stigi sum danski SU-stuðulin.

Anfinn Kallsberg segði, at á samráðingarfundinum 17. mars kom ein sera týdningarmikil sannroynd er komin á borðið.

- Á fundinum varð greitt sagt, at um danska stjórnin metir, at føroyska livistøðið mált í bruttotjóðarúrtøku pr. íbúgva verður hægri enn í amtum í Danmark, so verður heildarveitingin til Føroya minkað. Á fundinum vísti stjórnin somuleiðis á, at eftir hesum máti er livistøðuð í Føroyum longu ájavnt ella á hægri enn eitt nú Bornholms Amt.

- Hesin upplýsingurin, sum framsøgumaðurin hjá danska javnaðarflokkinum síðani hevur endurtikið í donsku fjølmiðlunum, er sera týdningarmikil. Hann sigur okkum, at valið stendur ikki millum fullveldi við hørðum búskaparligum krøvum, mótvegis einum heimastýri við donskum peningaveitingum.

Løgmaður gjørdi tí greitt, at valið hjá føroyingum stendur hinvegin ímillum:

1. Fulla ábyrgd og fult sjálvræði við einum sáttmála um búskaparliga skiftistíð fyri danskar peningaveitingar til Føroya.

2. Ella framhaldandi heimastýri uttan fult sjálvræði og uttan fulla ábyrgd, har skiftistíðin verður framd av donskum myndugleikum, uttan at vit hava ræðið á gongdini.

Hann legði afturat, at í Hvítubók varð víst á, at føroyingar undir øllum umstøðum skulu laga seg búskaparliga til eitt samfelag uttan blokkstuðul úr Danmark, tí hetta kann skapa ein sjálvberandi og tryggari búskap. Tað sama siga flestu danskir búskaparfrøðingar.

- Tí er tað sostatt bert ein spurningur um, hvussu vit semjast um at seta sáttmálauppskot landsstýrisins í verk, soleiðis at føroyski veljarin kennir seg tryggan at taka við avbjóðingini.

- Landsstýrið hevur biðið um at fáa komandi fund í Føroyum, og at samráðst verður liðugt um allar teir partar av sáttmálanum, sum verulig samráðing hevur verið um.

- Landsstýrið kannar møguleikarnar fyri at fáa eina veruliga samráðingarstøðu við altjóða fordømum um slíkar samráðingar.

- Í sambandi við hesar samráðingar skal landsstýrið eisini útvega eitt óheft búskaparligt grundarlag, sum kann nýtast sum grundarlag fyri eini politiskari semju um eina rímiliga búskparliga skiftitstíð.

Landsstýrið hevur biðið um, at næsti samráðingarfundur verður beint eftir summarfrítíðina, men danska stjórninsigur, at tað ber ikki til at koma fyrrenn eftir fólkaatkvøðuna um evruna í september.

